# Hava regatta aftur í ár

**10. august fara hósvíkingar at skipa fyri regatta, sum fer av Eiði og endar í Nólsoy**

10. og 11. august skipa Hósvíkar Róðrarfelag og bygdafelagið Varðin fyri Regatta 2001. Allir bátar kunnu verða við, og sagt verður frá góðum streymi hetta vikuskiftið.

Lagt verður fyri á Eiði fríggjakvøldið 10. august klokkan 19.30, tá bátarnir leggja frá landi. Siglt verður til Hósvíkar, og um 9-tíðina verður steðgað við Streymin. Bátarnir koma væntandi til Hósvíkar kl. 22.30, og tá verður harmonikkutónleikur á kaiini.

Tað verður gist í Hósvík, og fólk kunnu seta telt upp í bygdini. Tey, sum ætla sær at verða leingi uppi, kunnu fara í dans í Bygdarhúsinum, har Moonshot fer at spæla. Dansurin kostar 80 krónur.

Leygardagin verður kósin sett til Nólsoyar, har Ovastevna er tað vikuskiftið.

Bátar og fólk, sum hava hug at luttaka í regattaini kunnu tekna seg fram til 7. august. Tað kostar 100 krónur fyri hvønn persón, og tað gjaldið er fyri luttøkuna og mat fríggjakvøldið og leygarmorgunin.

Gjaldast kann á 9181 1333099, og tað skal viðmerkjast navnið á bátinum, og hvørji fólk eru við.

Tilmelding kann gerast á telefon nummrunum 422589, 422578, 422368, 422148 ella 422096.

Tað ber eisini til at tekna seg til á teldubústaðinum regatta2001fo@yahoo.dk.

Stuðlar fyri tiltakinum eru Vestlax, Bátatænastan og Føroya Sparikassi.

# Fleiri ætla at fanga Tjaldrið

**Men tað ber næstan ikki til at ímynda sær, at nakar skal taka FM heitið frá NSÍ dreingjunum**

5–MANNAFØR DREINGIR
*Jóannes Hansen*

Tað er stórur spenningur undan fyrsta FM róðrinum á ólavsøku. Dreingjabátarnir rógva altíð fyrst. Og hóast luttøkan í dreingjaróðrinum í ár ikki hevur verið so stór, sum hon hevur verið fleiri onnur ár, so tykist kappingin um fremsta plássið í ólavsøkuróðrinum at vera rættuliga stór.

Eftir teir báðu fyrstu róðrarnar bendi alt á, at Tjaldrið skuldi verða so eina ráðandi, sum NSÍ dreingirnir vóru í fjør, tá teir vunnu allar seks FM róðrarnar. Men síðani hevur tað myndað seg øðrvísi.

Havnardreingir umborð á nýggja Sílinum vunnu á varmakeldustevnuni í Fuglafirði, og á vestanstevnuni vóru tað argjadreingir umborð á nýggja Bliki, sum vunnu.

Bæði Sílið og Blikur hava síðani á vestanstevnuni vant heilt nógv róðrarteinin av Argjahøvda og framvið Molanum. Og í vikuni hava fleiri gulir bátar verið at sæð á Havnarvág – millum annað Tjaldrið við dreingjamanning.

Tað kann roknast við, at ein av hesum trimum bátunum fara at vinna ólavsøkuróðurin. Men á vestanstevnuni vóru ábendingar um, at ein fjórði bátur ætlar at bjóða av í stríðnum um fremsta plássið. Nýggja Fípan Fagra var fremst ein fittan part av róðrarteininum, men so mistu teir og endaðu á triðja plássi.

Tá teir komu til hús aftur úr Sørvági, søgdu Fípu dreingirnir, at teir høvdu ikki disponerað rætt. Tí søgdu teir seg hava mist so nógv í endaspurtinum.

Bátarnir hjá Klaksvíkar Róðrarfelag hava ikki verið ímillum teirra, ið hava vant á Havnarvág í hesi vikuni, men tað er einki at ivast í, at royndu rógvararnir umborð á hinum bátunum í Klaksvík hava nágreiniliga lagt teimum yngru lag á, hvussu tað skal rógvast á ólavsøku.

Tjaldrið er sjey stig fremst í FM kappingini. Tí er eingin ivi um, at teir fara at vinna FM heitið. Men kappingin ímillum dreingjabátarnar er so mikið tøtt, at tað tykist vera lítil munur millum eitt fyrsta og eitt fjórða pláss.

## Støðan 5-mannafør dreingir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Tjaldrið | | 31 |
| 2. | Blikur | | 24 |
| 3. | Sílið | | 18 |
| 4. | Fípan Fagra | | 16 |
| 5. | Frúgvin | (1G) | 13 |
| 6. | Havfrúgvin | | 8 |
| 7. | Drekin | | 0 |
| 8. | Beinta | | 0 |
| 9. | Erla Kongsdóttir | | 0 |
| 10. | Firvaldur | | 0 |

# Soleiðis liggja bátarnir á ólavsøku

**5-mannafør**
1. Beinta
2. Sílið
3. Havfrúgvin
4. Tjaldrið
5. Blikur
6. Fípan Fagra
7. Frúgvin (1G)
8. Drekin
9. Erla Kongsdóttir
12. Frúgvin
13. Dúgvan
14. Snípan

**6-mannafør kvinnur**
1. Sølmundur
2. Snopprikkur
3. Fortuna
4. Leirvíkingur
5. Jarnbardur
6. Páll Fangi
7. Gongurólvur
8. Víkingur
9. Hvessingur
10. Lómur

**5-mannafør gentur**
1. Báran
2. Beinta
3. Hvassi
4. Drekin
5. Havfrúgvin
6. Tjaldrið
7. Blikur
8. Fípan Fagra
9. Sílið
10. Ørnin
11. Firvaldur

**6-mannafør menn**
1. Lómur (1G)
2. Kollfirðingur
3. Gongurólvur
4. Riddarin
5. Páll Fangi
6. Sølmundur
7. Strálan (1G)
8. Hvessingur
9. Snopprikkur
10. Fortuna
11. Fuglfirðingur

**8-mannafør**
1. Heiðabátur
2. Argjabáturin(1G)
3. Knørrur
4. Nevið Reyða
5. Kvívíkingur (1G)
6. Ørvur

**10-mannafør**
1. Suðuroyngur
2. Nólsoyingur
3. Vestmenningur
4. Havnarbáturin (1G)
5. Eysturoyingur (1G)
6. Skálabáturin (1G)



# Súkklukappingin verður avgjørd á ólavsøku

**Føroysku súkklararnir hava á summarstevnunum kring landið kappast um at gerast vinnari av + Konto Súkklukappingini. Tríggjar kappingar hava verið, og nú er bert ein eftir.**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Trý umfør av Pluss Konto súkklukappingini hava verið, og í øllum kappingunum hevur Gunnar Dahl-Olsen verið fyrstur á mál.

Hann liggur tí best fyri at vinna kappingina samanlagt. Vinnarin fær 40 stig, og Gunnar hevur tí 120 stig samanlagt.

Í hølunum á nummar eitt liggur Esmar Joensen og Sverri M. Edvinsson. Hesir hava ávikavist 98 og 94 stig, og hava tí møguleika at vippa Gunnar av ovastu rók. Men illa skal ganga hjá Gunnari, tí heili 22 stig skilja nummar eitt og tvey.

Nógv kann tó henda í seinasta umfarinum av + Konto Súkklukappingini, tí fleiri av luttakarunum frá Statoil Kring Føroyar súkklukappingini fara at luttaka, eisini vinnarin frá ólavsúkklingini í fjør, Kenneth Gormsen.

Vinnarin av Statoil Kring Føroyar 2001, Bogi Kristiansen, verður eisini við, og fer hann helst at seta sín dám á kappingina.

Býarkoyring, ið er heitið á súkklukappingini, ið súkklað verður á ólavsøku, er tann súkklugrein sum Bogi dámar best, og tað verður tí helst hann, ið er favorittur fríggjakvøldið.

Kappingin hjá teimum vaksnu byrjar kl. 20.30.

**Børnini sleppa eisini at royna seg**

Aftur í ár sleppa børnini at royna seg á ólavsøku. Børnini verða býtt sundur í tríggjar aldursbólkar. Bólkur I eru børn í aldrinum 6-8 ár. Bólkur II eru børn frá 9 til 11 ár, og bólkur III eru børn í aldrinum 12 til 14 ár. Gentur kappast fyri seg og dreingir fyri seg.

Tórshavnar Súkklufelag hevur í vár skipað fyri súkkluvenjing fyri børn, og fleiri av hesum børnum fara helst at royna seg í kappingini fríggjakvøldið. Tá súkklað var á jóansøku var sera javnt millum fleiri av súkklarunum, og spenningur verður tí fríggjakvøldið kl. 19.30, tá barnasúkklingin byrjar.

**Teinar**

Kappingin fer fram niðri á Vágsbotni/Skálatrøð. Mál og startur er við standmyndina av Nólsoyar Páll. Tey vaksnu koyra niðan eftir Grím Kambansgøtu, oman eftir Sigmundargøtu og síðan aftur á Skálatrøð.

Børnini koyra eins stytttri tein. Hesin er frá standmyndini, niðan eftir Grím Kambansgøtu, síðan oman eftir Bøgøtu og aftur á Skálatrøð.

Børnini koyra millum 4 og 8 umfør, meðan tey vaksnu koyra í 50 minuttir pluss eitt umfar.

Børnini byrja sum sagt kl. 19.30 og tey vaksnu kl. 20.30.

Føroya Sparikassi letur heiðurmerki til vinnararnar og til vinnaran av samlaðu kappingini.



# Tríggir ætla at bjóða Nevinum av

**Umborð á Knørri eru sera royndu rógvararnir spentir upp á, um tað hesa ferð skal eydnast teimum at taka meistarabátin úr Klaksvík**

8-MANNAFØR
*Jóannes Hansen*

Mest spennandi róðurin í Sørvági var tann millum 8–mannaførini. Nevið Reyða vann og gjørdist meistari, men munurin aftur til næsta bátin var minni enn eitt sekund.

Ta ferðina bjóðaðu Knørrur, Kvívíkingur og Argjabáturin Nevinum Reyða av. Teir skiftust um at leypa á, og tá var tað, at Martin Venned umborð á Nevinum Reyða helt fyri, at róðurin hevði verið sum ein súkklukapping.

At tað var so tætt á vestanstevnuni leggur upp til ein sera spennandi ólavsøkuróður.

Kvívíkingur, sum vann í Fuglafirði liggur framvið. Argjabáturin, sum vann allar róðrarnar í fjør, men sum við so at siga somu manning ikki hevur verið so heppin í ár, hevur fleiri ferðir víst, at teir vilja vera við. Nú er síðsti møguleiki hjá teimum, og so er tað Knørrur, sum var næstfremst í Sørvági, júst sum hann var tað á norðoyarstevnu og á jóansøku.

Kanska fer Nevið Reyða á ólavsøku at fáa størstu kappingina frá Knørri, har manningin hevur nógvar royndir. Teir hava róð nógv undanfarnu árini. Umframt við Knørri hava onkrir róð við t. d. Havnarbátinum og Kvívíkinginum. Miðaldurin er óvanliga høgur – 33 ár. Bara tveir eru í tjúgunum. Hinir eru allir í tredivunum.

Ætla tit at taka Nevið Reyða á ólavsøku?

– Tað hava vit ætlað hvørja ferð, og tað ætla vit eisini hesa ferð. Tað eru fleiri enn vit, sum ætla tað, so tað verður spennandi.

Tað er bátsformaðurin á Knørri, Jógvan Edvard Jacobsen, sum vit tosa við.

Men tað hevur ikki eydnast higartil?

– Tað eiga teir umborð á Nevinum Reyða alt rós uppiborið fyri. Teir hava róð stak væl, og teir eru favorittar á ólavsøku.

Hví hevur tað gingist betri hjá teimum, enn hjá tykkum og øðrum?

– Tað er ilt hjá mær at tosa fyri hinar. Vit hav a roynt, og tað hevur gingið rætta vegin. Seinast høvdu vit ein góðan endaspurt, og tá restaði lítið í, at vit tóku klaksvíkingarnar. Men teir eru sera drúgvir. Tað man vera tí, at teir hava lagt eitt ógvuliga stórt arbeiði í venjingina, og tað fáa teir løn fyri. Hóast vit hava nógvar royndir, so haldi eg, at teir umborð á Nevinum Reyða eru betri samanróðnir, enn vit eru. Tað eru fleiri ár síðani, at onkrir umborð hjá okkum róðu síðst, og tað tekur langa tíð at finna saman.

Hvat kunnu tit betra fyri at fáa eitt uppaftur betri úrslit, enn tit hava havt?

– Ólavsøkuróðurin verður øðrvísi, enn hinir róðrarnir hava verið. Higartil hava vit róð 1500 metrar. Nú skulu vit rógva 900. Tað verður hægri ferð alla tíðina. Vit hava havt góðan endaspurt, meðan miðróðurin hevur ikki verið nóg góður. Vit hava roynt at betra um hetta, sigur Jógvan Edvard Jacobsen, bátsformaður umborð á Knørri, sum samstundis vísir á, at tað hevur verið at sæð, at teir umborð á Nevinum Reyða heldur ikki hva verið nøgdir við sín miðróður:

– Soleiðis er tað í kappróðri. Sjálvt teir bestu kunnu altíð finna okkurt, sum kann gerast betri, heldur Knørra maðurin og tykist avgjørt einki hava ímóti, at gera Nevið Reyða til stórfavoritt á ólavsøku.

Sum nevnt omanfyri, so vann Argjabáturin allar róðrarnar í fjør. Tá vit líta at úrslitunum fyri 2000, so síggja vit, at talan hevur verið um stóra útskifting í toppinum. Í fjør var Toftabáturin næstbestur, og Gullbrandur endaði í triðja plássi. Teir í róðrarfelagnum NSÍ mannaðu Toftabátin, og vestmenningar mannaðu fuglfjarðarbátin. Hvørgin teirra hevur tikið lut í kappingini í summar.

Í fjør endaði Nevið Reyða á fjórða plássinum. Nú hava teir vunnið FM. Teir í Klaksvík halda sjálvandi, at tað hevði verið krúnan á verkinum, um tað hevði eydnast teimum at vinna á ólavsøku. Teir hava besta møguleikan, men fyrrverandi meistararnir á Argjum, veteranarnir umborð á Knørri og ungu kvívíkingarnir, sum snýttu Nevið Reyða í Fuglafirði, ætla allir at gera sítt fyri at vinna ólavsøkusteypið og harvið bjarga róðrarárinum.

Um Knørrur skal taka silvurmerkini frá Kvívíkingi, so skulu teir vinna, ella skulu teir vera tvey pláss undan Kvívíkinginum. Nevið Reyða hevur 33 stig, Kvívíkingur hevur 24, Knørrur 22 og Argjabáturin hevur 16 stig.

Tað er lagt upp til eina øgiliga kapping á teimum 900 metrunum av Argjahøvda og inn undir Skipafelagið.



## Støðan 8-mannafør

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Nevið Reyða | | 33 |
| 2. | Kvívíkingur | (1G) | 24 |
| 3. | Knørrur | | 22 |
| 4. | Argjabáturin | (1G) | 16 |
| 6. | Heiðabáturin | | 4 |
| 7. | Ormurin langi | | 4 |

# Mozyr neyvan víðari

**Millum hini mongu liðini, sum mikukvøldið vóru í europeiska eldinum, var Slavia Mozyr úr Hvítarusslandi. Tað var hetta liðið, sum fyri viku síðani gjørdi av við VB.**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Mikukvøldið gekst tað ikki so væl á heimavøllinum í Mozyr. Teir høvdu vitjan av Inter Bratislava, og alt bendir á, at slovakiska liðið hevur fingið meiri enn annað beinið í triðja innleiðandi umfarið, har norska Rosenborg verður mótstøðuliðið. Dysturin endaði 1–0 til Inter Bratislava.

Tveir gamlir Europa Cup kenningar hjá føroyskum feløgum hittust mikukvøldið. Finsku meistararnir, FC Haka, sum HB eigur at komast við, høvdu vitjan av ísraelska meistaraliðnum, Maccabi Haifa, sum hevur spælt í Europa Cup ímóti KÍ.

Og tað vóru KÍ vinirnir, sum vóru teir fegnastu mikukvøldið. Maccabi Haifa vann 1–0 í Finnlandi, og tískil bendir alt á, at tað verða teir, sum fara at halda fram í Europa Cup kappingini.

## Europa Cup innleiðandi 2. umfar – fyrri dysturin

| | Úrslit | Hálvleiksstøða |
|---|---|---|
| FC Slavia Mozyr -– ASK Inter Bratislava | 0-1 | (0–1) |
| FC Skonto – TS Wisla Kraków | 1-2 | (1-2) |
| FC Shakhtar Donetsk – FC Lugano | 3-0 | (1-0) |
| FC Torpedo Kutaisi – FC København | 1-1 | (0-1) |
| Omonia FC – FK Crvena Zvezda | 1-1 | (0-1) |
| PFC Levski Sofia – SK Brann | 0-0 | |
| Galatasaray SK – KS Vllaznia | 2-0 | (1-0) |
| RSC Anderlecht – FC Sheriff Tiraspol | 4-0 | (2-0) |
| FC Steaua Bukarest – FK Sloga Jugomagnat | 3-0 | (2-0) |
| Ferencvárosi TC – HNK Hajduk Split | 0-0 | |
| NK Maribor – Rangers FC | 0-3 | (0-1) |
| Bohemian FC – Halmstads BK | 1-2 | (1-1) |
| FC Porto – Barry Town AFC | 8-0 | (5-0) |
| FC Haka – Maccabi Haifa | 0-1 | (0-1) |

# Undirhald áðrenn finaluna

Fólk, sum koma tíðliga til steypafinaluna hjá monnum í fótbólti, fara ikki at keða seg. Skipað verður fyri undirhaldi av ymsum slagi.

Vanliga koma áskoðarar seint til fótbóltsdystir í Føroyum, men í ár eru nógvar góðar orsøkir til at møta tíðliga til steypafinaluna millum B36 og KÍ á Tórsvølli.

Tangz og All that Rain fara at spæla nakað væl áðrenn dystin, og tá er rocktónleikur á skráni.

Fimleikagentur úr Havn fara at dansa, og GHM fer at spæla. GHM hevur vant sangir hjá KÍ og B36, og teir ætlar orkestrið at spæla frammanfyri áskoðarunum.

**ek**